# Broyting til hoyringsskriv

**Vísandi til løgtingsmál nr. 149/2019: uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um matstovuvirksemi og gistingarhúsvirksemi (Matstovulógin) (hereftir nevnt lógaruppskotið)**

Dagfest hin 16.06.2020 varð hoyringsskriv latið inn í samband við omanfyri nevnda lógaruppskot og var hoyringsskrivið frá fylgjandi mat- og skeinkistøðum:

- Glitnir
- Irish Pub
- Tórshøll
- Basecamp
- Loca
- Jómfrúbakkin
- Sirkus Føroyar
- Luux

Í hoyringsskrivinum til lógaruppskotið, var:

<u>í fyrsta</u> lagið ongin viðmerking, treytað av:

at áseting verður sett inn í lógaruppskotið, sum heimilar fult endurgjald fyri mistar inntøkur, um heimildin verður brúkt til at skerja virksemi og

at gildistíðin verður stytt niður til 31. August 2020

<u>í øðrum</u> lagi var staðiliga mótmælt lógaruppskotinum.

<u>**Undirritaðu mat- og skeinkistøð vilja hervið gera fylgjandi broytingar til fyrstalags kravið, um "ongar viðmerkingar"**</u>

Undirritaðu mat- og skeinkistøð <u>**taka undir við, at løgtingsmál nr. 149/2019 verður viðtikið, men hetta treytað av:**</u>

at um virksemi hjá undirritaðu verður avmarkað meir enn til at hava opið til kl. 02, so verður veitt endurgjald, eins og eftir uppskoti til hjálparpakka 3 *(Løgtingsmál nr. 147/2019: Uppskot til løgtingslóg um stuðul til ferðavinnufyritøkur fyri fastar útreiðslur í sambandi við COVID-19),*

at um onnur skipan verður viðtikin, og hendan endurrindar meir enn omanfyri nevndi hjálparpakki, so verður endurgjald veitt undirritaðu eftir hesari skipan,

at endurgjaldsábyrgdin er galdandi, so leingi, sum lógaruppskotið er galdandi og

at heimildin einans verður brúkt til at avmarka virksemi, um so er, at Covid-19 verður staðfest í Føroyum, at sera nógv eru vorðin smittaði og at smittuvandin tískil er heilt serliga stórur.

Tórshavn, hin: 18.06.2020

Luux

Jomfrúbakkin

SIRKUS FØROYAR

Loca & Bassalt

Glitnir / IRISH PUB

hvonn

Basecamp / TABOO

Haps-essabar